## DAGSINS MEINING

# Frændavitjan

Í hesum døgum vitjar hópur av íslendingum í Føroyum. Talan er um sera stór vinnuliga sendinevnd við forsætisráðharranum, Halldór Ásgrímsson, á odda. Hetta, at sjálvur forsætisráðharrin er á odda fyri sendinevndini vísir, hvussu stóran dent íslendingar leggja á samvinnu við Føroyar. Halldór Ásgrimsson er høgt í metum og hevur stóra virðing millum føroyskar politikkarar og vinnulívsfólk. Føroyskir politikkarar kenna Halldór frá norðurlendskum samstarvi, har hann altíð hevur sýnt seg sum hin fremsti vinur føroyinga. Eisini á búskaparliga samstarvsøkinum sum eitt nú í samráðingum um fiskirættindi hevur Halldór verið føroyingum dyggur. Halldór Ásgrímsson er sannur og hollur føroyavinur, og tað er Føroyum ein heiður, at hann kemur á almenna vitjan her hjá okkum. Halldór og allur hópurin skulu vera hjartaliga vælkomnir til land okkara.

Føroyingar og íslendingar hava allar orsøkir at samstarva. Báðar tjóðir liva av havsins livandi tilfeingi, báðar tjóðir av gomul søgulig felags minni og føroyingar og íslendingar hava samstarvað vinnuliga síðan 1880. Báðar tjóðir hava fingið globaliseringina og altjóðagerðina inn um landamørkini, og eygsýnt er fyri øllum, at hesa avbjóðing hava íslendingar tikið við sera heppnari og sterkari hond.

Her er nógv at samstarva um á búskaparligum eins væl og á politiskum økjum. Vit hava nógv at læra av íslendingum, tá um globaliseringina ræður. Íslendingar hava í áratíggjur mett allan heimin sum teirra búskaparliga leikvøll. Hetta kemur ikki minst til sjóndar í Danmark, har íslendskar fyritøkur taka yvir eina danska stórfyritøku fyri og aðra eftir – ikki hissini fyrtøkur, nej fyritøkur sum í donskum hugaheimi eru meira at kalla kultstøð enn fyritøkur. Her er ikki bert vinna men tungur symbolikkur og ikki heilt einki av politikki.

Íslendingar og føroyingar eiga nú av álvara at fara undir búskaparligt og politiskt samstarv. Vit hava fingið amboðið til hetta samstarv, Hoyvíkssáttmálan – nú er bert eftir at fylla karmarnar í hesum sáttmála. Øki, ið tað er upplagt at samstarva um, eru mentan, gransking, útbúgving, KT tøkni og aðar vitansvinnur, fiskivinna, ferðavinna og altjóða samstarv. Settar eiga at vera samstarvsnevndir, ið skulu hava sum setning at fylla út karmarnar i Hoyvíkssáttmálanum. Hetta krevur nógv av okkum føroyingum. Vit føroyingar mugu læra okkum at vinna á óttanum fyri tí stóra og fremmanda, tá um búskaparliga samvinnu ræður. Her hava vit aftur nógv at læra av frændunum fyri vestan hav. Men kanska hava vit okkurt at læra teir eisini, treyðugt so. Vit ynskja enn einaferð frændum okkara hjartaliga vælkomnum til Føroya og ynski okkara er, at nógv gott og úrslitaríkt samstarv fer at spyrjast burturúr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ársins rossahandil



HJALMAR N. POULSEN
Vestmanna
hin 1. apríl 2006

**Lat tað vera sagt beinanvegin, at orðini ikki eru blaðfest fyri at lokka hampafólk apríl**

Nú Fiskavirking er einskild og hevur skift eigarar, kann ein og hvør gera sær tankar hesum viðvíkjandi. Havi í hvussu so er gjørt mær mínar.

Ásannast má, at sluttspurturin í tilgongdini, kann samanlíknast við endabreståtsølu við alstórum avsláttri. Ja, snøgt sagt »ársins rossahandil«. Tað at fyritøkan fyri sløkum trimum árum síðan, kundi seljast fyri yvir 80 mill. kr. meira vísir, hvussu ódugnaliga fyriskipað er.

Formaður Framtakgrunnsins royndi at frásiga sær sína skuld av hesum, segði at hetta var so tað, vit kundu megna á hesum sinni. Hon ballaði trupuleikan ræ ttuliga væl inn, men helt uppá, at mótloysni valdaði undir útsøluni. Komedian endaði við, at ikki slappst av við samlaðu ognina av ávísum grundum. Hetta vísir vissuliga heimføðisliga dugnaloysi í landsins umsiting, og tað í stóran mun.

Sambart formansfrágreiðingini var høðusorsøkin til stóra avslátturin keyparirnir fingu tann, at uppboðið upp á fyritøkuna var ov vánaligt, at potentiellar útlendskar keypisterkar vinnu- og fíggingarfyritøkur høvdu mist áhugan at bjóða. Hetta grundað á, at føroysku »vinnupolittisku viðurskiftini«, ikki vóru holdbar.

Hon sipaði her helst til, tá fiskivinnuumsitingin loyvdi russum at keypa upsan fyri spottprís á sinni, fyri síðan at útkonkurera føroyska útflutningin av somu vøru.

Fíggjarmalaráðið eigur sanniliga eisini sín leiklut í vanvirðisliga heitunum, Føroyar hava fingið. At føroysku vinnupolittisku viðurskiftini sigast vera óholdbar, er sjálvsagt, tá hugsað verður um ta ferðina, SEV skamtaði streymveitingina fyrrapartin í juli 2005, tá alt landið so at siga lá lamið. Her fingu SEV og Maskinmeistarafelagið alla skuldina. Tað vísti í hvørtfall diktatoriska tilgongdin í løgtinginum á sinni.

Men veruleikin er ein heilt annar. Arbeiðsósemja var als ikki ímillum áðurnevndu partarnar. Tvørturímóti var semja um sáttmálaviðurskiftini og ájourføring gjørd. Hetta kostaði landskassanum, sum kunnugt, ikki so mikið sum eitt klovið oyra. Og klárt var til undirskrivtirnar.

At fíggjarmálaráharrin gjørdi seg sekan í valdmisnýtslu, vrakaði demokratiskta semingsuppskotið, og hartil við vilja eisini misbrúkti lógarásettu heimild sína, við greitt at misbrúka ásetingarnar í føroysku kommunulógini, var veruliga orsøkin til streymskamtanníná. Tað var ógvuliga naivt hugsað, at júst hetta ikki einaferð skuldi koma okkum aftur um brekku. Og nú gongur sjón fyri søgn.

Nú føroysku vinnupolitisku viðurskiftini sigast vera komin í ringt ljós og óholdbar, kann fíggjarmálaráðharrin fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri. Landsumsitingin og løgtingsmeirilutirin eiga sanniliga eisini sín bróðurpart í óskilinum.

Spurningurin er so, um man skal halda, at tað gongur nokk álíkavæl, ella konkretisera og siga: »FAST TAKI TEIMUM«!

# Fundarsamtykt: Til ovasta kirkjumyndugleika í Føroyum

URGULEIKARA-FELAGIÐ
V/ Jens Mortan Mortensen, formanni

**Á aðalfundi í *Urguleikarafelagnum* 25 mars 2006 var samtykt at skriva opið bræv til ovasta kirkjumyndugleika í Føroyum.**

Í nógv ár hava ymsu kirkjuráðini í Føroyum tikið stór tøk til tess at byggja kostnaðarmiklar og góðar urgur. Onkur skal halda fram, har ið kirkjuráðini hava lagt lunnar, og urguleikarar eru ikki at finna undir hvørjum steini. Hetta ger at trupulleikin at fáa sjálvboðið fólk at binda seg árið á tamb bara veksur heldur enn minkar.

Tí spyr Urguleikarafelagið:

Hvør hevur ábyrgdina av, at tað í t.d. Gjógv situr ein urguleikari hvønn einasta heiligdag í árinum umframt við **Allar** aðrar kirkjuligar handlingar?

- Er tað ovasti kirkjuligi myndugleikin?
- Er tað kirkjuráðini?
- Ella er tað mentamálaráðið?

Við tað at føroyska kirkjan verður yvirtikin 1 jan. 2007 meta vit, at tað má hava miklan áhuga hjá kirkjuligu myndugleikunum, hvør tað er, ið skal bera okkara sálma/sangskatt víðari.

Sum er verður sungið minni og minni í skúlunum. Hetta er tragiskt, tí sangur hevur stóran mentalan mátt og er heilsufremjandi. (Dømi: ein Ólavsøkunátt á Vaglinum í Havn, har fjøldin ikki kennir sangirnar.)

Urguleikarafelagið hevur á aðalfundinum samtykt at:

- Urguleikarar skulu hava samsýning fyri arbeiði sítt.
- Teir urguleikarar ið nú virka, mugu hava sjúkavikarar og avloysarar.
- Kirkjan kann skriva út eina kapping í at yrkja nýggjar nútíðarsálmar, sum siga ungdóminum nakað um teirra egna lív og umhvørvi.
- Urguleikarafelagið sær fram til ein fund við Jógvan á Lakjuni kirkjumálaráðharra.

Okkara visjón 2015 er, at tað í øllum størri bygdum sita urguleikarar í føstum starvi. Hesi skulu saman við skúlaverkinum hava ábyrgd fyri, at sálma/sangskatturin verður borin víðari til komandi ættarlið. Sambært Hagtalsbókini fyri 2004 eru 84% av øllum føroyingum limir í føroysku fólkakirkjuni, og eitt so stórt tal forplyktar kirkjuligu myndugleikarnar at taka felag okkara í álvara.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.